# Fólkaflokkurin og ábyrgd

EYÐGUNN SAMUELSEN
tingkvinna



Sorgblítt at hoyra formann Fólkafloksins í Degi & Viku eftirlýsa ábyrgd í fíggarpolitikkinum, nú stórt hall er á fíggjarlógini. Víðari segði hann, at vit mugu síggja álvaran og ikki sleppa øllum leyst, tí so verður hallið á fíggjarlógini 1 milliard. Undirtónin er týðiligur, at Fólkaflokkurin borgar fyri einum ábyrgdarfullum fíggjarpolitikki, og tað má so merkja, at tað gera hinir samgonguflokkarnir ikki.

Í tilgongdini at gera bæði ólavsøkupakka og fíggjarlóg hava sum vera man verið uppskot um at taka av bygnaðarligar skeivleikar. Men næstan undan undantak hevur Fólkaflokkurin sett seg ímóti. Besta trygdin fyri, at vit framvegis hava eina røð av stuðulsskipanum til bæði vinnu og borgaran er sami Fólkaflokkur, sum nú rópar um fíggjarliga ábyrgd. Eg síggi, at ungmannafelagið hjá Fólkaflokkinum Huxa sigur, at allur stuðul til vinnu skal takast burtur. Av hesum átti Fólkaflokkurin at tikið við læru.

Sjálvur situr Jørgen sum landstýrismaður í uttanríkismálum og ger avtalur. Kann nevna 7 rammuskránna hjá ES, sum Jørgen tekur sær æruna av í fjølmiðlunum. Avtalan kostar 10 mió í 2010. Men tað er ikki uttanríkisráðharrin ið skal útvega fíggingina. Nei tá tað kom til fíggingina, tá átti landsstýriskvinnan í mentamálum ábyrgdina.

Uttanríkisráðið er á tremur við fólki og kostar hópin av peningi, og var einasta ráðið, ið fekk øktar karmar í 2010, við eini játtan á 9 mió til at marknaðarføra Føroyar.

Ein annar landsstýrismaður hjá fólkaflokkinum skuldi fáa inntøkutrygdina út til partarnar á arbeiðsmarknaðin. Hetta er ikki hent enn, og tí mangla 50 mió á hesi kontu á fíggjarlógini fyri 2010. Óneyðugt er at siga, at landsstýrismaðurin hevur boðað frá, at hann ikki kann finna sparingar fyri hesa upphæddina.

Einasta boð uppá sparingar, ið vit hava hoyrt frá Fólkaflokkinum, var at løggeva sáttmálabundna lønarhækkingin hjá alment løntum burtur. Hetta er nær um einasta boð uppá loysn , ið Fólkaflokkurin higartil er komin við. Men tað er hópin av uppskotum, ið teir ikki vilja góðtaka.

Á íløgusíðuni hevur Fólkaflokkurin markerað seg við, at bæði Norð um Fjall og Sandoyartunnilin skuldu á fíggjarlógina fyri 2010. Hesar íløgur merkja eina øking av skuldini hjá landskassanum við 1,5 milliard.

Tí skal meira enn vanligt hugflog til, um ein skal keypa orðini hjá Jørgen Niclasen um, at hann og Fólkaflokkurin borga fyri at fáa ábyrgd inn í fíggjarpolitikkin.

# Flogvøllurin gjørdist ein drívmegi í føroyska búskapinum

FRANK DAVIDSEN
Sørvágur



Nógvar ritgerðir eru skrivaðar seinastu árini av øllum hugsandi slag. Tá ein so hugsar um, hvønn ómetaligan týdning flogvøllurin hevur havt á tað føroyska samfelagið, síðani tveir framskygdir sørvingar tóku stig til millutjóðaflúgving fyrst í trýssunum, so átti hettar risaframbrotið, ið flutti føroyska samfelagið áratíggjur fram, at veri eitt sera viðkomandi granskingarevni. Ein ritgerð um hetta hevði helst kunnað givið okkum eina ábending um, hvar Føroya land búskaparliga og mentanarliga hevði verið ídag, um Lars Larsen og Hugo Fjørðoy bara lótu standa til.

Aftaná seinna heimsbardaga lá ein eftir tátíðar umstøðun vælútgjørdur flogvøllur í Vágum. Flúgviljós við sera sterkun glasi vóru niðurfeld báðu megin lendingarbreytina. Tað, sum síðani hendið, er ein sorgarsøga. Landsins mynduleikar góvu vøllin upp fyri skutil, við tað at teir góvu loyvi til, at allir kaðalirnir til ljós og annað, harav nógvir vóru blýggjbelagdir, vórðu skræddir upp og seldir fyri lítið og lætt.

Hetta var eitt greitt tekin um, at flogvøllurin í Vágum longu tá ongan góðan átti, og at okkara álit varð sjóðvegis samband við meginlandið. Tað var tí eitt megnaravrik, ið Lars og Hugo gjørdu, tá byrjað varð í einum lítlun skúri við flogvøllin undir so vánaligum umstøðum, at var tað ikki fyri teirra hugflog og optimismu, so var henda ætlan, ið kom at hava so ómetaligan tydning fyri okkara samfelag, deyð í egginum.

Og tað er helst eingin ivi um, at okkara samfelag hevði ikki verið tað sama, og tað so langt í frá, um flogvøllurin ikki var tøkur.

Aftaná fløvandi samtykt Sjálvstýrisfloksins og greiðu útmeldingina frá fyrrverandi framsøgumanni Tjóðveldis í vinnumálum um, at hann stendur við løgtingsuppskotið um Vága Floghavn, og at flogvøllurin skal útbyggjast til 1799 metrar, havi eg nú eina greiða fatan av, at konspirasjónspolitikararnir kunna teljast á einari hond, og hava teir eittans endamál: at draga málið út, soleiðis at Vága Floghavn og útbyggingin skal enda í ruðuleika.

At so Vinnuhúsið nú eisini heilt greitt tekur frástøðu frá teimun, ið leggja fótonglar við at royna at útseta avgerðina um at fáa verklagslógina samtykta, tað eiga vit at fegnast um.

Tað skal vera mín inniliga vón, at Føroya Løgting tekur undir við hesi altavgerðandi útbygging av flogvøllinum, og at terminalurin verður nútímansgjørdur aftaná 30 ára status quo. Eisini skal tað vera mín vón, at Lars Larsen og Hugo Fjørðoy koma at uppliva, at tað sáðið, ið teir fyri 45 árum síðan við miklum áræði sáddu, og sum hevur givið okkara oyggj og tí føroyska samfelagnum eitt sovorðið frambrot, ikki sleppur at steðgast av teimun, sum hava sovið í tímanum.

# Oljuskiljiskipanin Oil Conveyor til Kina

**Thor í Hósvík hugsar grønt og vil hava oljufrían kjøl umborð á Athenu, sum í løtuni er til umvælingar í Kina. Teir hava tí bílagt oljuskiljiskpanina "Oil Conveyor" frá Faroe Maritime Technic í Vági, sum fer til avskipingar í næstum**

SKILJISKIPAN
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Á Faroe Maritime Technic í Vági, hava tey hesa síðstu vikuna gjørt kláran ein "Oil Conveyor" at senda til Kina. Tað er Thor Fisheries í Hósvík, sum hevur bílagt hesa skipan til verksmiðjutrolarin "Athenu", sum í løtuni er til umvælingar í Kina. Hjá Thor hugsa tey grønt og vilja í hesum sambandið í hægsta mun stuðla føroyskum vinnulívi, við t.d. at keypa trolútgerð frá Vónini, orkusparandi lemmar frá Rock Trawldoors, oljuskiljiskipan frá Faroe Maritime Technic, og annars nýta føroyskar veitarar.

Á Faroe Maritime Technic eru tey sera væl nøgd við, at føroysk reiðarí vilja vera millum tey fyrstu at fáa bast oljutrupuleikanum á hendan hátt. Báðir partar er væl nøgdir við sáttmálan og Thor væntar, at kostnaðarstøði á innlating av oljudálkaðum vatni fer at lækka munandi. eftir at skipanin er ísett.

Arbeitt verður við at fáa tungoljuna brenda umborð til m.a. upphitan. Tað verður arbeiðsfólk frá Faroe Maritime Technic, ið fara til Kina at íseta skipanina og tryggja, at alt virkar sum tað skal. Onnur føroysk reiðaríir vísa eisini skipanini áhuga, verður sagt á Faroe Maritime Technic .

### Søluarbeiði byrja av álvara

- Síðani skipanin varð víst fram á Danfish messuni á Aalborg, er áhugin fyri skipani vaksin munandi. Fyrispurningar um skipanina koma úr øllum skandinavia og í næstum verður farið til Íslands, Finnlands og Noreg , har sølufólk hava bjóðað okkum at vísa skipanina fram, sigur Kaj Joensen, ið hevur ment skipnanina, ið tekur upp olju úr kjølinum á skipum.



# Tráðleyst breiðband í Havn

**Tórshavnar Kommuna arbeiðir í løtuni at finna út av, hvussu kommunan kann veita tráðleyst internetsamband í miðbýnum í Havn, og hevur samtykt at seta 200.000 krónur av til verkætlanina**

KUNNINGARTØKNI
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Tað var Levi Mørk, býráðslimur, sum gjørdi nógv við hendan spurningin í valstríðnum. Nú hevur umsitingin hjá Tórshavnar Býráð fingi ein formligan fyrispurning um, at umsitingin kannar møguleikarnar fyri at kommunan veitir alnótaratgongd, gjøgnum sokallaði 'Hotspots'.

Umsitingin heldur, at uppskotið frá politikaranum um, í fyrstu atløgu, at veita alnóta-atgongd innanhýsis í kommunalum bygningum er eitt gott stað at byrja. Tað er avmarkað til at ganga einari umbøn frá gesti um at fáa alnótasamband inni í einum kommunalum bygningi, á møti. Tað er ikki í stríð við løgfrøðina.

Næsta stigið kundi verið at veitt bátagestum, bilgestum og øðrum ferðandi atgongd til alnótina.

Tað eru sjálvandi nógv viðurskifti, sum skulu kannast, áðrenn kommunan ger av at veita eina tænastu, og eru nógv fyrivarni. Í uppritinum frá kommununi verður sagt, at tað skulu gerast kanningar, bæði um hvørjir veitarar skulu veita loysnina, hvør tøkni skal brúkast, hvør skal reka loysnina og hvørji atlit skulu takast, so tað ikki stendst løgfrøðisligur ruðuleiki av nýtsluni av alnótini.

- Vit sleppa sostatt ikki undan stýring av hvør fær atgongd, so tað setir beinanvegin spurningar um tøkni og mannagongdir, til dømis hvussu ein fær atgongd og hvør skal geva hana. Tørvur á atgongd er ofta eftir vanliga arbeiðstíð, so tað setir avmarkingar til hvør er tøkur. Í uppskotinum standa Reinsaríðið, Perlan og Býarbókasavnið nevnd. Hetta eru støð, har manning er tøk, sum kann veita atgongdina.

- Fara vit í aðru syftu at veita ferðandi alnótasamband ber ikki til at siga, hvat tað kemur at kosta, tí tað krevur neyvar kanningar. Til at geva atgongdina hava vit tó døgnvakt á Tórshavnar Havn og á Sløkkiliðnum.Tað er upplagt at kanna um áhugi er millum virkir at reka skipanina, verður sagt.

Sagt verður eisini, at hóast alt hetta finst í grannalondunum, so er neyðugt hjá okkum at kanna hvørji serlig føroysk atlit eru at taka.

Sum útgangspunkt skal brúkarin rinda fyri tænastuna soleiðis, at hon er útreiðsluneutral fyri kommununa.

Miðfyrisitingarstjórin og KT-leiðarin mæla í fyrstu atløgu til at kanna møguleikan fyri, at uttanhýsis veitarar kunnu loysa uppgávuna. Í øðrum lagi verður mælt til, at stjórnin mannar ein bólk at gera eina verkætlan sum fevnir um:

**Stig 1:** at veita alnótasamband til gestir í Perluni, Reinsarí'ið og Býarbókasavnið

**Stig 2:** at veita alnótasamband til ferðandi og leggur hana fyri fíggjarnevndina. Samstundis verður mælt til, at settar vera kr 200.000 av til fyrra stigið.

Fíggjarnevndin hjá Tórshavnar Kommunu samtykti 18. november at taka undir við at kanna møguleikan fyri at uttanhýsis veitrarar kunnu loysa uppgávuna.